FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

FRUMRIT

# Fráfaringaravtala

millum

**Fíggjarmálaráðið**

og

**Hilmar Eliasen, stjóra á Strandfaraskipum Landsins**

**Semja um at enda starvsviðurskiftini**
Partarnir eru samdir um, at setanaravtalan dagfest 4. mai 2017 millum Fíggjarmálaráðið (tá Samferðslumálaráðið) og Hilmar Eliasen er søgd upp frá 1. mai 2022 at rokna við 8 mánaðir freist til endaligt uppathald tann 1. januar 2023. Hilmar Eliasen fær goldið avtalaða løn og eftirløn til vanligt forfall sambært setanaravtaluni í uppsagnartíðarskeiðinum.

**Fráferð og fríttstilling**
Hilmar Eliasen er fríttstillaður frá undirskrift av hesi avtalu. Hilmar Eliasen skal tí ikki møta til arbeiðis ella fremja arbeiði í uppsagnartíðarskeiðinum, tó so at hann uttan serskilda samsýning fram til 1. juli 2022 skal verða til taks sum ráðgevi og svara spurningum um mál, hann hevur arbeitt við til 21. februar 2022. Hilmar Eliasen hevur í hesum sambandi ikki skyldu at møta í hølum hjá Strandfaraskipum Landsins.

Fær Hilmar Eliasen annað starv hjá landinum í fráfaringartíðini, verður henda lønin mótroknað, tó ikki fyrstu 3 mánaðirnar eftir 1. mai 2022. Hilmar Eliasen hevur tí skyldu beinanvegin at siga Fíggjarmálaráðnum frá, um hann fær annað starv hjá landinum í fráfaringartíðini.

**Frítíð**
Ikki hildin uppspard feria fyri frítíðarárið 2021/2022 verður útgoldin við endan av mai 2022. Høvuðsferian fyri frítíðarárið 2022/2023 verður útgoldin við endan av januar 2023. 5. feriuvikan fyri frítíðarárið 2022/2023 verður roknað sum hildin í tíðini fram til endaligt uppathald.

Frítíð vunnin í tíðarskeiðinum frá 1. apríl 2022 fram til endaligt uppathald, verður flutt í frítíðargrunnin. Víst verður til lóg um frítíð við løn.

Hilmar Eliasen hevur tvær óútgoldnar serstakar frívikur til góðar. Hesar serstøku frívikur, umframt serstaka frívikan vunnin í tíðarskeiðinum fram til endaligt uppathald, verða útgoldnar við endan av januar 2023 eftir reglunum í vegleiðingini um serstøku frívikuna.

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☎ (+298) 35 20 20 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

**Arbeiðsútgerð**
Telda, telefon og onnur arbeiðsútgerð skal latast Strandfaraskipum Landsins skjótast gjørligt og í seinasta lagi tann 1. juli 2022. Útgerð sum telda, teldil ella telefon kann tó keypast samsvarandi reglunum í rundskrivi nr. 9002 frá 3. desember 2014 um burturbeining av KT útbúnaði.

**Loyalitetsskylda**
Partarnir hava skyldu til at vera loyalir mótvegis hvørjum øðrum í uppsagnartíðarskeiðinum. Eisini hevur Hilmar Eliasen tagnarskyldu eftir galdandi lógarreglum.

**Til fulla og endaliga avgreiðslu v.m.**
Við hesi fráfaringaravtalu eru øll fíggjarlig og ikki fíggjarlig viðurskifti millum Fíggjarmálaráðið og Hilmar Eliasen endaliga avgreidd.

Semja er um at halda innihaldið í hesi avtalu í trúnaði uttan so, at annað er galdandi sambært lóg ella rættarúrskurði.

Hilmar Eliasen váttar, at hann er umboðaður av advokati í sambandi við undirskrift av hesari fráfaringaravtalu.

Strandfaraskip Landsins rindar kr. 15.000 + MVG í advokatútreiðslum.

Hilmar Eliasen hevur rætt til samrøður / viðgerð hjá sálarfrøðingi ella líknandi ráðgeva fyri í mesta lagi kr. 6.000. Hetta treytað av, at samrøðurnar / viðgerðin fer fram í seinasta lagi við tann 1. januar 2023, og rokningin er send Strandfaraskipum Landsins í seinasta lagi 15. januar 2023.

**Sáttmálaeintøk**
Avtalan er sett upp í tveimum frumritum, eitt til hvønn partin.

Tinganes, 11 apríl 2022

Uni Rasmussen
Uni Rasmussen
landsstýrismaður

Hilmar Eliasen
Hilmar Eliasen

Bjarni Askham Bjarnason
Aðalstjóri